# Klaksvíkar Sjúkrahús

# Sjúkrarøktarfrøðingur til skurðgongina

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi til ambulatoriugongina. Talan er um avloysarastarv á lønarbrøki 0,7 frá 01.04.24-31.08.25. Arbeitt verður í dagtíð.

Á ambulatoriið koma sjúklingar til skaðastovu, skurð-, ortopædkirurgisk-, urologiskt ambulatorium og ESWL (steinknúsing).

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**

- veita sjálvstøðuga sjúkrarøkt, viðgerð og eftirkanningar
- geva heilivág, injektiónir og tablettviðgerðir
- kunna sjúklingar og avvarðandi um sjúku, heilivág við meira
- tvørfakligt samstarv við læknar, fysioterapeutar og aðrar viðkomandi fakbólkar.

**Vit kunnu bjóða:**

- eitt ábyrgdarfult, avbjóðandi sjálvstøðugt og fjøltáttað starv
- innleiðslu og upplæring við útgangsstøðið í tínum fakligu kvalifikatiónum og royndum
- vit hava fokus á toymisarbeiði, ynskja ein jaligan hugburð, sum ávirkar bæði trivna og góða sjúklingagongd.

**Førleikar:**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- hollar kliniskar royndir innan kirurgiska økið
- góð evni at samskifta og samstarva
- góð evni at arbeiða málrætta og strukturera
- kann arbeiða sjálvstøðugt.
- góður starvsfelagi og kann geva íkast til góðan arbeiðsfelagsskap.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við deildarleiðara, Anna Maria Dahl, tlf. 40 45 09, ella teldupost: annam@ks.fo ella Súsanna Olsen, varastjóra, tlf. 220366, teldupost susanna@ks.fo

Umsókn, saman við avriti av prógvi og CV, skal sendast til: umsokn@ks.fo

**Umsóknarfreistin er 16.02.2024.**

*Á heimasíðu okkara www.ks.fo kanst tú lesa um okkara visjón, missión og strategimál undir leinkjuni "Sjúkrahúsið".*

*Sjúkrahúsverkið fevnir um tey trý sjúkrahúsini Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús. Okkara uppgáva er at veita øllum dygdargóðar heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð.*

*Vit eru trý sjúkrahús, sum samskifta, virka og skapa eftir felags virðum. Í Sjúkrahúsverkinum vísa vit virðing fyri sjúklingunum, avvarðandi og starvsfólki, og miða altíð eftir at veita rættstundis sjúkugreinan og viðgerð við skipaðum sjúklingagongdum.*

*Sjúkrahúsverkið er eitt fjølbroytt arbeiðspláss, har virðini stev, áræði og flog, eru okkara kumpass, sum vit brúka í okkara yrki í gerandisdegnum. Í Sjúkrahúsverkinum starvast út við 1.200 starvsfólk innan 30 ymiskar fakbólkar.*